## DAGSINS MEINING

# Ráðgeving um framtíðina

Búskaparráðið er komið við síni statusfrágreiðing og vekir henda frágreiðing sum altíð stóran áhuga. Ikki óvæntað setir ráðið frágreiðingina í mun til Visión 2015 og leggur ráðið dent á, at tøknilig menning er lykilin til hesa visión. Útbúgving, gransking, opinleiki og kapping eru lyklaorðini í frágreiðingini, sum hevur fingið heitið »Tøknilig menning og vælferð«.

Sum væntað verður mælt til at fremja einskiljingar av almennum fyritøkum, eins og mælt verður til at styrkja kappingarráðið. Tað verður undirstrikað, at vit liva ikki bert av fiski men av einum væl mentum førleika at innflyta og at tillaga útlendskt uppfunna tøkni til brúks í framleiðsluni í Føroyum. Nógv áhugavert er í frágreiðingini, sum er sera saklig, um en bersøgin. Tað er líkasum, at tónalagið í hesari frágreiðingini er ikki so nógv merkt av hevjaðum fremstafingrum, betrivitan og moralisering, sum ofta hevur verið siðvenja hjá ráðnum seinastu árini. Veikleikin er klárt, tað sum ein ráðslimur vísir á, nevniliga at oljuprísirnir fara tvísporandi upp í loft, uttan at ráðið nenvir hetta.

Hinvegin er boðskapurin ikki til at misskilja: haldast má fast um einskiljingarnar, tað má satsast nógv meria upp á útbúgvingar, og vit skulu ikki stýra teimum ungu inn á ávísar útbúgvingar og útbúgvarlond. Hetta seinasta er nýtt og sera áhugavert og skal helst skiljast sum ein roynd til ikki at skerja kreativitetin hjá teimum ungu. Vit eru bert á 20. plássi enn, so her skal eitt ódnartak til, um vit skulu røkka upp á støðið hjá okkara grannum. Frágreiðingin hevur eisini radikal sjónarmið eitt nú, at ikki kunnu røkka hesum málum við at verja tey ófakærdu arbeiðsplássini. Hetta sjónarmið má fáa fakfeløgini at ressast og at krevja eina klára strategi fyri at sleppast kann undan vinnuloysi. Her er frágreiðingini ikki nóg greið, men hevur mest yvirskriftir og føgur orð um útbúgving, gransking og ávaringar móti almennum tiltøkum á vinnuøkinum. Vit venda aftur til hesa áhugaverdu fragreiðing.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fjákalótir úr Skopun

**Hans D. Nielsen**

Nú var hann aftur framvið, við sínum fjákutu og ikki minst lítisigandi viðmerkingum um tað syndigu verð, vit liva í. Ikki kann sigast annað enn, at Gerhard Lognberg roynir at føra seg fram sum aðrir menn, um tað so er samkynd ella brennivín talan er um, so tykist Gerhard at halda seg hava eina loysn upp á, hvussu vit onnur skulu liva og skikka okkum í hesum landi.

Sandoyarfólk hava altíð borið orð fyri at verið skemtingarsom av lyndi, og man tað tí eisini vera í skemti, tey hava valt Gerhard inn á ting. Kanska munnu tey halda, at ikki nóg nógv býtt verður sagt av tingsins røðarapalli og vilja tí bøta um hettar við at geva Gerhard møguleikan at siga sítt fjákuta vrøvl uttan fyri Sandoynna eisini.

Havi ofta sitið framman fyri sjónvarpinum og hugt eftir orðaskiftinum á tingi og má siga tað, at ein skal leita longi eftir einum so fjákutum og illa fyrireikaðum løgtingsmanni, sum Gerhard Lognberg er. Hann tykist ikki at hava ánilsi av, hvat gongur fyri seg rundan um hann, tosar upp í sama og um hann stendur fastur, sum ofta hendur, ja so hevur hann tann fyrimunin, at hann kann blanda várharra uppí fyri at koma víðari.

Nú Gerhard fekk ilt í afturpartin av, at nøkur friðarlig samkynd hildu ráðstevnu í Norðurlandahúsinum, so má sigast, at ráðstevnan kom væl við hjá honum kortini, tí har var aftur ein møguleiki at blanda várharra upp í dagsins kjak.

Um Gerhard er so tollutur, at hann heldur, at bara hann og ikki vit onnur vita, hvat stendur í halgubók, so má hann bara trúgva umaftur, tí er tað nakað, sum vit øll hava fingið inn við skei gjøgnum allan okkara uppvøkstur, so er tað júst tað andaliga, men tað er so ikki tað sama sum Gerhard, Jenis og aðrir hava fingið burturúr tí heilagu skriftini.

Til seinast skal eg koma við einari áheitan og vegleðing til Gerhard & Co um heldur at brúka meira tíð upp á at viðgera meira álvarslig mál sum standa á dagsskránni í hesum døgum, har kann eg nevna sum dømi avtøku av oljuavgjaldinum, so familjur í hesum landi sleppa frá at sita køld við glintandi tonnum, men aftur fáa ráð at fylla sær tangan og fáa hita í kroppin, hettar kundi eisini bøtt um støðuna hjá teimum samkyndu, sum so eisini høvdu sloppið frá at ligið alt ov tætt saman undir dýnuni og synda fyri at halda varmanum.

# At senda fólk á mánan er ónátúrligt!

**Oddfríður Marni Rasmussen**



Í farnu viku hevur verið ráðstevna í Norðurlandahúsinum fyri teimum samkyndu. So skjótt sum útlendsku gestirnir vóru lendir, fingu føroysku krympireyvarnar alvorligt gorlop. Bíbliusitatini hava staðið í kø at rættvísgera teirra niðurgerandi úttalilsi. Vit hava talu- og skrivifrælsi í Føroyum, so sjálvandi kann ein og hvør siga sína meining. Tað, sum harmar meg mest og fær øði í meg er, at ongin talar ímóti hesum óvenjing-unum. At Gerhard Lognberg og Jenis av Rana hava sínar meiningar, vita flest øll. Tað, sum er ósømiligt er, at ein landsstýrismaður, og so enntá í menta, kirkju- og skúlamálum, alment ber fram slík brot á mannarættindi. Eg veit um næming í fólkaskúlanum, sum er vorðin hóttir, tí hann er samkyndur. Tað, sum eg kundi hugsað mær at vita er, um landsstýrismaðurin umboðar tann, sum hóttir ella tann samkynda?

Prestarnir í hansara kirkju eru í øllum førum so mikið at sær komnir, at teir halda sínar meiningar fyri seg sjálvar. Teir siga ikki, tá ið teir signa samkomuna: Eg signi tykkum øll uttan teg á aftasta bonki, sum er samkyndur. Prestar hava helst hvør sína meining um hetta eyma mál, men teir velja at tiga, tí teir tæna fólkinum. Ráðharrin í menta-, skúla- og kirkjumálum velur ikki at tæna fólkinum. Hann velur heldur at tæna sínari egnu samkomu, har tey flestu ikki eru limir í fólkakirkjuni. At ongin tinglimur, sum hevur aðra meining enn hesir tríggir, hevur mótmælt, sigur mær so mikið, at teir hava somu meining sum hesir. Fyrsta røða løgmans var fyri teimum samkyndu, og tað einasta hann kann siga er, at allir tinglimir í hansara flokki mega hava egnar meiningar um etisk mál. Tað vil siga, at tá hoyra teir ikki til Javnaðarflokkin, men skifta í annan ham, annan flokk, ið hevur somu politisk mál sum teir.

Fyri gott og væl trimum árum síðani var eg í Íslandi, og var eg í Hallgrímskirkjuni, har ein svenskur samkyndur prestur helt eina sera rámandi prædiku. Hann nam við, hvussu ymiskir lærusveinarnir hjá Jesusi vóru, og so endaði hann við at siga, at um Jesus livdi í dag, hevði hann helst valt sær ein lærusvein, sum var samkyndur, tí hann livdi sítt lív fyri at hjálpa teimum, sum samfelagið ikki skoytti um. Um Jógvan á Lakjuni hevði arbeitt fyri øllum økinum, sum hann umsitir, átti hann ikki at slongt slíka fráboðan út alment, heldur átti hann at viðurkent tey samkyndu sum ein part av samfelagnum, ið ikki hevur somu sømdir sum onnur og arbeitt fyri teimum. Tað hevði verið nátúrligt um landsstýrismaðurin í skúla-, mentan- og kirkjumálum setti hesa ráðstevnu. Kirkju-, skúla- og mentamálaráðarrin kallar ístaðin tað at vera samkyndur fyri ónátúrligt. Tað er so nógv, sum er ónátúrligt. At senda fólk upp á mánan er ónátúrligt. At koyra í bili undir sjónum er ónátúrligt, men at vera samkyndur er nátúrligt í einum framkomnum samfelag, sum júst hevur lagt eina visiónsætlan fram til 2015. Tey hava eitt kynslív, ið ikki altíð líkist tí hjá okkum hinskyntu, men er tað ein orsøk at nokta teimum kærleika og rættin til at skráseta seg í parlagi, er tað ein grund til at spotta tey, at reka tey av landinum? Alla aðrastaðnis í heiminum hevði tað verið ónátúrligt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.